ítróttur

Nr. 208 • mikudagur • 30. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Javnleik móti afrikansku leyvunum

Føroyska talvlandsliðið telvaði javnt móti Sambia, sum hevur fingið frálík úrslit higartil í kappingini

TALV
Jákup Sørensen

Bled: Føroysku telvarnir vistu ikki rættiliga hvat teir skuldu væntað sær av telvarunum úr Sambia, vanliga er afrikanskir telvarar ikki so sterkir, men sambisku leyvurnar hava rættiliga bitið frá sær í Bled.

Teir báðir sambisku telvararnir á fremstu borðunum hava rættiliga gjørt hol í sjógvin í hesi OL kappingini. Í fyrsta umfarið hildu teir báðir javnt móti sterkum stórmeisturum úr Bosnia-Hersegovina og í øðrum umfarið vístu teir at fyrra úrslitið ikki var av tilvild - teir endurtóku úrslitið móti Brasil, sum eisini hevur stórmeistarar á fremru borðunum. Dysturin hjá Sambia í øðrum umfari var einasta verðuliga sensatión higartil í kappingini, dysturin endaði við javnleiki 2-2.

John vann

Men John Rødgaard kláraði tað, sum hvørki bosniskir ella brasilskir stórmeistarar kláraðu, hann knógvaði Stanley Chumfwa (2252) og vístið føroysku leiðina fram í móti enn einum javnleiki. John Arni fekk remis á fyrsta borði móti altjóða meistaranum Amon Simotowe (2383) og eftir tilvið var hann toluliga væl nøgdur við tað, men sum vanligasta viðmerkingin hjá telvarunum er eftir javnleik, - tað er stuttligari at vinna.

Á fjóðra borði kom føroyameistarin Hans Kristian Simonsen kom sær heilt tíðliga í talvinum í stórar trupulleikar og teir flestu av føroysku telvarunum væntaðu at lítið kom burturúr. Men við seiggi kom hann aftur í aftur og knógvaði einum javnleiki.

Hjá Eyðuni Nolsøe gekk verri, hann stríddist manniliga og seinastu 20 minuttirnar var lítið at ivast í at tap var í hendi, men hann royndi til tað allarseinasta at venda gongdini, tíanverri til onga nyttu.

Á eini leið

Eftir dystin segði John Rødgaard at hetta á pappírinum helst ikki var eitt so gott úrslit, men um hugsa verður um frálíku úrslitini hjá Sambia, so var tað á heilt góðari leið.

Føroyar hava nú fimm stig fyri 3 dystir, sum helst er á eini leið, men tað er kortini ikki rættiliga so nógv, sum telvarnir høvdu ætlað sær. Gongst sum telvararnir ætlað so hava teir fingið helvtina av teimum møguliga stigunum, tá ið kappingin er liðug annan sunnudag.

Dysturin í gjár var í móti Jameika, sum er styrkismett nummar 98. Føroyska liðið móti Jameika var mannað soleiðis: John Arni Nilssen, John Rødgaard, Heini Olsen og Martin Poulsen. Dysturin byrjaði klokkan 13.30.

Martin Poulsen skuldi vera partur av føroyska liðnum, sum beint eftir evstamark okkara skuldi í eldin móti Jameika

Allar stjørnurnar telva

Væl verður fylgt við, tá heimsins sterkasti kvinnuligi telvari, ungverska Judith Polgar (í miðuni), situr við borðið

Nú er tann seinasta av teimum stóru stjørnunum kom í stóri Íshøllina í Bled, har telvað verður. Talan er um Peter Leko úr Ungarn, sum komandi ár, skal telva í hálvfinaluni um heimsmeistaraheitið móti Garry Kasparov. Í teimum báðu fyrru umførunum hevur væl umtókta Judith Polgar sitið á fyrsta borðið hjá Ungarn. Um borðið hjá henni er altíð riðil av fólkið, tí tað er ikki á hvørkjum degi, at tú sært kvinnur stríðast við menn á jøvnum føti í ítrótti. Judith Polgar er heimsins besti kvinnuligi telvari.

-js

Fagnaður forsetavalinum í Kalmykia

FIDE forseting, Kirsan Ilyumzhinov, er júst valdur forseti í Kalmykia

TALV
Jákup Sørensen

Bled: Dagurin í gjár byrjaði við, at allir telvarnir klappaðu fyri FIDE forsetanum Kirsan Ilyumzhinov. Kunngjørt var at hann hevði vunnið valið í gamla sovjetlýðveldinum Kalmykia. At kalla allir telvarir og onnur sum varða av talvi hava mestsum verið í andaleypi seinastu 14 dagarnar. Tey hava bíða alspent eftir forsetavalinum í Kalmykia, tí núverandi FIDE forsetin Kirsan Ilyumzhinov er eisini forseti í Kalmykia, eitt av mongu lýðveldunum sum vóru í gamla Sovjetsamveldinum. Fyrra valumfarið í Kalmykia var fyri 14 døgum síðani og tá fekk Kirsan Ilyumzhinov bara 47% av atkvøðunum, so annað umfarð skuldi eisini vera. Kirsan Ilyumzhinov hevði annars boða frá, at um hann tapti valið í Kalmykia, so stillaði hann ikki uppaftur til valið í FIDE á aðalfundinum 2. november og so hevði verið sperðil í, tí einki mótvalevni er.

Umstríddur maður

Tað kann tykjast undarligt at telvarar sýna slíkan áhuga fyri forsetavalinum í Kalmykia og hvør forseti verður í FIDE. Men her er talan um persónin Ilyumzhinov, ti hann er sera gávumildur móti talvítróttini, seinastu árini hevur hann latið fleiri enn 300 milliónir dollarar til telving um allan heim og serliga at sameina talv ítróttina aftur, eftir at Kasparov eina tíð hevur tikið seg burturúr FIDE felagsskapinum. Talan er ikki um FIDE pengar, men um pening, sum Ilyumzhinov hevur goldið sjálvur. Hvar hann hevur fingið allan hendan peningin frá, spyr eingin telvari ella nakar annar um – hugburðurin tykist vera at frægast er at vita um minst.

Hóast hesa eftir okkara vanligu norðurlendsku hugsan heldur ivasamu framfer er eingin sum kann gera nakað við tað sannroynd at meðan Ilyumzhinov hevur sitið við stýrisvølin hevur talvið gjørt stór framstig runt alllan heimin og nú letur til, at teir eisini sleppa við í altjóða olympisku nevndina IOC. Talv hevur verið framsýningar ítrótt á tveimum teimum seinastu olympisku leikunum og hesaferð er olympiska nevndin umboða í Bled, og fyri fyrstu ferð verður kannað um telvarar eru dopaðir.

Størsta bragdið hjá Ilyumzhinov mann helst vera at hann hevur fingið semju í lag millum felagsskapin hjá Garry Kasparov Mind Games og so altjóða talvsambandið soleiðis at í seinasta lagið í 2004 verður aftur ein heimsmeistari í talvi og bara ein. Í løtuni eru teir tveir. Kramnik er heimsmeistari hjá Kasparov, men spyrt tú FIDE so er Ruslan Ponomariov heimsmeistari. Men sambært ætlanunum hjá Ilyumzhinov og FIDE verður slíkt ikki at vera eftir 2004, tá verður bara ein heimsmeistari. Tí var tað við stórum áhuga og við gleði at tey 1000 fólkini í Skoytuhøllini í Bled klappaðu fyri sigrinum hjá Ilyumzhinov, tí annars var vandi fyri at øll framgongdin fyri bakkað. So kann tað gera tað sama, at pengarnir sum hann kemur við, kanska eru ivasamir. Teir gera somu nyttuna tykjast telvarar halda.

Fremsti føroyski sýnisgluggin betri enn nógvir aðrir

KÍ málverjin livir í somu vón sum so nógvir aðrir um, at tað skal eydnast at fáa góðan yrkissáttmála uttanlands, men hann heldur ikki, at fyritreytirnar gerast betur av at fara til danskt felag í lægru deildunum, heldur enn at vera í føroysku 1. deildini

YRKISFÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Men eg haldi ikki, at fyritreytirnar at sleppa víðari betrast av at spæla í næstbestu donsku deildini heldur enn at spæla í 1. deild í Føroyum, sigur Meinhardt Joensen

Fríggjadagin kom KÍ málverjin, Meinhardt Joensen, aftur av ferð í Danmark. Har hevði hann royndarvant í eina viku við Randers Freja, sum telist ímillum tey fremstu í næstbestu deildini, og sum hevur Atla Gregersen ímillum spælararnar, sum stríðast fyri at vera á besta liðnum.

Meinhardt Joensen hevur verið fyrsta valið millum stólparnar á besta KÍ liðnum tey bæði seinastu árini. Hann hevur lagt nógva orku í venjingina, og hóast hann sjálvur er fyrstur til at ásanna, at hann framvegis hevur nógv eftir at læra, so hevur menningin verið stór.

– Eg var við landsliðnum á Kypros í vetur, og so fekk boð at venja saman við teimum, tá Liktinstein var í Føroyum í august, og tað ikki bar Jákupi Mikkelsen til at vera við til allar venjingarnar. Tað gevur blóð á tonna. Eg haldi ikki, at eg eigi rætt til landsliðsplássi í løtuni. Men tað ræður um at vera klárur, um møguleikin verður. Málverjuplássini eru fá at kappast um, men tað hevur samstundis við sær, at gloppið verður so mikið nógv størri, tá ein fellur frá, um tað so er orsaka av leikbanni ella skaða, sigur KÍ málverjin, sum hevur eina serliga frágreiðing, tá vit halda fyri, at hann leikliga tóktist mennast nógv hetta kappingarárið:

– Eg havi í ár havt møguleikar at læra sera nógv av Jens Martini Knudsen. Á arbeiðsplássinum var arbeiðsgongdin tann, at maðurin, sum arbeiddi leygardag hevði frí ein part av mánadegnum aftaná. Tað bar møguleikan við sær, at eg kundi fara út til Runavíkar, har Jens Martin og eg vandu. Tað er klárt, at ein ungur og óroyndur maður, sum eg eri, tá ið sammett verður við Jens Martin, havi góðar møguleikar at læra nógv av honum.

Dreymurin

Tá ið vit spyrja KÍ málverjan, um hann ætlar sær at gerast yrkisspælari uttanlands, so heldur hann bæði beinini á jørðini:

– Eg rokni við, at teir flestu, sum spæla fótbólt, hava eina ella aðra vón um, at tað skal eydnast at sleppa upp í part úti í heiminum, og at tað skal bera til at liva av frítíðarítrivinum. Men eg haldi eisini, at nógva tosið og skrivingin um henda møguleika seinastu árini hava gjørt, at teir flestu eru greiðir yvir, at tað skal leggast nógv fyri, og at hepnið eisini skal til.

Men tú hevur verið uttanlands og royndarvant?

– Eg var í Randers fyri eina viku. Søgan er tann, at eg í summar ivaðist í at fara á handilsskúla í Randers. Tá fregnaðist eg um møguleikarnar at spæla fótbólt. Eg slerdi av at fara niður, men møguleikin er framvegis opin, og nú tók eg sjálvur stig til at fara til Randers Freja. Kim Poulsen, sum áður hevur vant Viborg, er venjari, og tað var spennandi at venja saman við teimum. Teir hava ein góðan fyrsta málverja, og eg hevði ikki roknað við, at eg í fyrstu atløgu hevði havt møguleika til annað enn pláss á beinkinum og at spæla á næstbesta liðnum. Venjarin helt eisini, at tað valdast um, hvat teir ætla. Felagið er tvær ferðir farið á húsagang. Um teir vilja eina bíliga loysn, so hevði eg verið ein møguleiki, men um teir enn eina ferð ætla at satsa, so kann tað hugast, at teir velja ein eldri og meiri royndan málverja, sigur Meinhardt Joensen.

Viðurskiftini í Randers tala eru eitt sindur ótrygg. Venjarin, Kim Poulsen, fer úr starvinum á nýggjárinum. Hann skal vera U–18 venjari í Singapore. Fleiri møguleikar hava verið nevndir sum nýggir venjarar, eitt nú Lars Olsen, fyrrverandi danski landsliðsspælarin og liðformaðurin, sum er ein av venjarunum í Brøndby. Men einki er avgjørt.

Tað vil siga, at tú hevur ikki so stórar dreymar kortini?

– Dreymurin um at spæla uttanlands er har. Men eg haldi ikki, at fyritreytirnar at sleppa víðari betrast av at spæla í næstbestu donsku deildini heldur enn at spæla í 1. deild í Føroyum. Áhugin í fyri liðunum, sum eru við í kappingini um FM og sum taka lut í Europa Cup er ivaleyst størri, enn hann er fyri liðunum í lægru deildunum í Danmark, og spurningurin er, um munurin í støðinum er so stórur. Eftir at hava verið í Randers haldi eg, at vit eiga spælarar, sum eru eins góðir og kanska betri, enn nógvir av teirra eru. Teir standa seg kanska betri, tí teir spæla fótbólt ein størri part av árinum, enn vit gera í Føroyum.

Veruleikin

Í KÍ er framvegis ógreitt, hvør verður venjari næsta kappingarár. Tað hevur ljóðað at onkrar lokalar loysnir hava verið upp á tal. Vit skilja á lagnum, at leiðslan í felagnum framvegis arbeiðir við at finna aðrar loysnir, men tað er kanska ikki so lætt nú, tá ið tað er so langt útliðið.

Tað er heldur ikki greitt, hvørjir spælarar verða á liðnum. Tað hevur ljóðað, at fleiri hava fingið góð tilboð aðra staðni frá, og tí valdar eitt sindur av óvissu.

– Eg havi ikki gjørt nakra avtalu. Mær hevði dámt væl at hildið fram í KÍ. Men samstundis vita bæði eg og aðrir, at pengar eru í føroyskum fótbólti, og so er einki at siga til, at man vil hava lut í køkuni. Men tað er hugalígt at spæla við KÍ, tá tað gongst væl. Áskoðararnir eru sera áhugaðir. At hálvt hundrað vóru við í Vági, sjálvt um vit so at siga høvdu mist FM møguleikan er bara fantastiskt. Eg vóni, at KÍ fær sáttmálarnar upp á pláss, og at vit við góðum venjara, sum megnar at geva íblástur, kunnu vera væl við í kappingini. Men einki kemur av sær sjálvum. Tað er eingin loyna, at fleiri eru eftir lyklaspælarunum hjá KÍ, so nú fáa vit at síggja, endar KÍ málverjin, Meinhardt Joensen, sum – uttan mun til hvar hann fer at spæla – er sinnaður at leggja nógv fyri í royndini at røkka hægri.

FM kappingin fyri lið

Farið verður nú undir liðkappingina í bridge

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

FM liðkappingin hevur tey seinastu árini koyrt við tveimum deildum, har seks lið árið fyri hava kvalifiserað seg at leika í 1. deild og frí tilmelding hevur verið í 2.deild.

1. deild

Liðini í 1. deild eru hesi:
Junior Buss Taxa
Allan Dal-Christiansen
Símin Lassaberg
Carl Mikkelsen
Jóna Grunnveit
Jórun Johannesen

Junior Buss Taxa við Boga Simonsen sum liðformanni vóru føroyameistarar í fjør og mugu teljast við millum favorittarnar í ár. Leikararnir á liðnum eru teir somu sum í fjør, umframt Boga eru á liðnum eisini Rói á Rógvu Joensen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen, allir landsliðsveteranar frá EM í Italia í summar.

Liðið hjá Allan Dal-Christiansen var føroyameistari í fyrraárið og teljast teir avgjørt eisini millum favorittarnar at gerast føroyameistarar. Liðið er óbroytt: Allan Dal-Christiansen, Dánjal Pauli Mohr, Per Kallsberg, Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen.

Eysturingar hava nógv ár liðið frammarlaga í bridge, men enn mangla teir at vinna FM fyri lið. Spurningurin er bara, nær tað verður, teir hava vunnið hóp av øðrum kappingum so sum FM fyri felag og steypakappingina. Teir, sum leika á liðnum í ár eru Símin Lassaberg, Magni Jøkladal, Árni Dam, Marner Joensen, Eyðun Augustinussen og Robert Langgaard.

Liðið hjá Carl Mikkelsen er endað á fjórða sæti nógv ár á rað. Við á liðnum hjá Carl leika eisini Egil Helmsdal, Atli Hansen, Jógvan Ranghamar, Marjun Restorff og Arnleyg Mikkelsen.

Á liðnum hjá Jónu Grunnveit leika eisini Henriette Svenstrup, Niels Nielsen, Eyðun Jensen, Pól Jensen og Øssur Winthereig.

Liðið hjá Jórun Johannesen var eitt ár í 2.deild og flutti upp aftur í 1.deild í fjør. Við á liðnum hjá Jórun eru eisini Johannes Skaarup, Oddmar Danielsen og einar Ellingsgaard.

2. deild

Freistin at melda lið til í 2.deild er úti týskvøldið 29. oktober. Tey, sum ætla at tekna lið til kappingina, skulu seta seg í samband við kappingarleiðaran í FBS, Marjun Restorff tel 26 22 20 ella 31 91 42. Seinast, vit frættu, høvdu 10 lið tekna seg til kappingina í 2. deild, og tá vóru bara tvey lið úr Havn komin á listan, tvey úr Klaksvík, trý úr Eysturoy, eitt úr Vágum og eitt úr Suðuroy.

Hetta, at feløgini á bygd eru uppafturstaðin, kunnu øll bridgeáhugaði í Føroyum bara gleðast um, og nógv er, sum bendir á, at vit fáa eina áhugaverda, spennandi og ikki minst hugnaliga kapping í 2.deild í ár.

Spæla í Klaksvík

Tey fyrstu umførini í FM kappingini fyri lið verða spæld í Klaksvík komandi vikuskifti. Spælt verður í Sjómansskúlanum og byrjað verður leygarmorgunin 2. november kl 10.00. Spælt verður eisini sunnudagin.